# Hentir lutir til hent endamál

**Leygardagin skipaði Reyði Krossur fyri loppumarknaði í Vágsbotni. Ein slíka dag eru hølini alt ov lítil**

FELAGSSKAPIR
*Snorri Brend*



*Suni Vinther á vitjan í serbiska býnum Smederevo fyrr í hesum mánaðinum. Her stuðlar Reyði Krossur og Formula einum barnagarði fyri sigoynarabørn*

**Havn:** Tey sita so hugalig og fáa sær ein kaffimunn í tí lítla køkinum í ovastu hæddini.

Í hæddunum niðriundir er fultsett av fólki sum eru komin á loppumarknað. Har er trongligt av fólki, tí nógv eru um vilja stuðla Reyða Krossi á henda hátt.

Nøkur av sjálvbodnu starvsfólkunum hjá Reyða Krossi hava stríðst í langa tíð frammanundan við at fyrireika alt. Nú treingja tey til ein lítlan kaffisteðg og eitt lítið prát.

Tey eru ikki meiri enn komin í gongd við prátið, tá ein kvinna kemur niðan trappurnar.

Henda kvinnan er eisini komin á loppumarknað og fegnast um stóra úrvalið av klæðum og lutum. Hon er forvitin eftir meiri.

- Kann man eisini keypa okkurt heruppi?!, spyr hon.

Tíverri fyri hana ber tað ikki til. Ein kann bert keypa teir lutirnar, sum eru vístir fram í teimum báðu niðaru hæddunum.

- Hetta er annars eini deilig hølir tit hava, sigur hon, í tí hon fer niður aftur trappurnar.

Starvsfólkini smílast við. Hetta eru eisini deilig hølir, sum liggja mitt í býnum. Men ein slíkan dag sum í dag, nú loppumarknaður er á skránni eru tey í minna lagi.

Úrvalið av vørum og lutum er so stórt. Og tað eru tey vitjandi eisini. Men við lagaligheit fáa øll uttan iva fatur á tí tey vilja, samstundis sum tey eru við til at stuðla tí stóra arbeiðinum sum Reyði Krossur stendur í, heima og úti.

### Hentir lutir

Her uppi í køkinum er friður og tíð til eitt lítið prát afturvið einum góðum kaffimunni og einum køkubita.

Men fert tú eina ella tvær hæddir longur niður, so er øðrvísi: Har er ein øgilig rokan og øgiligt prát av fólki henda leygarmorgunin.

Reyði Krossur hevur fyri løtu síðani latið upp enn ein loppumarknað. Og tá tað er gjørt, so vita fólk at her munnu onkrir hentir lutir vera at fáa til keyps.

Tí streymar fólkið inn í avmarkaðu hølini hjá Reyða Krossi í Vágsbotni, tí tað ræður um at vera fyrstur, skalt tú vera vísur í at fáa júst tann lutin, tú ynskir tær.

Hølini eru ikki av teimum stóru, og tí er skjótt at tey fyllast við fólki. Men fólk kemur og ferð alla tíðina, so tað er ein javnur streymur av fólki, ið ynskir at hyggja, keypa og stuðla Reyða Krossi.

Lutirnir tey kunnu keypa eru í túsundatali: Klæðir, smálutir, ting at pynta við, skógvar, bøkur og mangt, mangt annað.

Og sum nevnt stendur ikki á at sleppa av við allar hesar lutirnar henda vakra vetrarmorgunin í farnu viku.

# Suni brennur fyri sakini

**- Er tað nakað sum Suni Vinther hevur dugað, so er tað at savna allar træðrirnar í okkara víttfevnda arbeiði. Heiðurin, sum hann nú fekk er fult uppiborin, siga fleiri av sjálvbodnu starvsfólkunum í Reyða Krossi.**

HEIÐUR
*Snorri Brend*



*Tað stóð ikki á at sleppa av við teir túsundtals lutirnar, sum Reyði Krossur hevði at bjóða fram á loppumarknaðinum leygardagin*

**Reyði Krossur:** "Suni er kendur sum ein ógvuliga engasjeraður formaður, sum hevur ment virksemið hjá felagsskapinum innan m.a. fyrstuhjálp og endurnýtslu".

Soleiðis varð m.a. tikið til í grundgevingunum, tá formaðurin í føroyska felagsskapinum, Suni Vinther fekk heiður sýndan frá systurfelagsskapinum í Danmark í farnu viku.

Hann hevur verið í nevndini síðani 1982 og hevur ótroyttandi arbeitt fyri felagsskapin og at fáa kunnleikan til felagsskapin út til onnur.

### Aktiverað

At Reyði Krossur í Danmark valdi at heiðra formannin í føroyska felagsskapinum við størsta heiðri hjá felagsskapinum - Dansk Røde Kors Fortjensttegn af 1. Grad - er neyvan av tilvild.

Í grundgevingunum fyri hesum verður eisini sagt, at hann hevur við virksemi sínum verið sera dugnaligur at aktivera bæði tey sjálvbodnu og tað føroyska fólkið.

- Hetta seinasta kom ikki minst til sjóndar við innsavningina til offrini eftir tsunami'ina fyri skjótt einum ári síðani, varð eisini dentur lagdur á í grundgevingunum.

Og tað er ikki frítt, at tað eru onnur eru limirnir í danska felagsskapinum, sum hava lagt merki til hetta.

Tað hava teir føroysku limirnir eisini.

### Alpha og omega

Leygarmorgunin var stórur loppumarknaður hjá Reyða Krossi.

Hesa løtuna nýtti eg høvið at spyrja fleiri av sjálvbodnu limunum í felagsskapinum um hetta sama.

Og her var niðurstøðan einmælt: - Suni Vinther er sera týdningarmikil fyri Reyða Kross í Føroyum. Hann er alpha og omega hjá okkum.

- Hann dugir sum fáur at savna okkum og allar træðrirnar í tí sjálvbodna arbeiðinum. Tað vísir seg at vera trupult at fáa fólk at standa fyri nøkrum í dag, men her hava vit so ein mann sum brennir fyri sakini.

- Saman við teim góðu fólkunum aftanfyri, hevur tað eydnast honum og okkum at menna Reyða Kross til ein felagsskap, sum fólk vita um og rokna við, siga sjálvbodnu hjálparfólkini.

### Í tí stilla

Hesi sjálvbodnu reyðakrossfólkini fegnast sjálvandi eisini um at formanni teirra varð vístur slíkur heiður frá felagsskapinum í Danmark.

- Henda heiðurin – ja, henda hevur hann so fult uppiborið, siga tey við ein munn.

Fyri tey hevur tað stóran týdning at hava ein persón, sum kann savna fólkið til hetta týdningarmikla arbeiðið. Og ein slíkan eiga tey í núverandi formanninum.

- Hann dugir av savna fólkið til arbeiðið. Einki við at rópa og gartera, men á sín stilla og friðarliga hátt hevur hann ment felagsskapin ótrúliga nógv hesi árini.

- Hann gongur við lív og sál inn fyri sakini, siga tey.

Eitt er so arbeiðið innanveggja í felagnum. Men sambært tey so hevur formaðurin eisini dugað sera væl at kunna vanliga fólkið um virksemið í Reyða Krossi.

- So vóna vit bara, at tey taka ímóti boðskapinum.

### Sakna tey ungu

Júst hetta seinasta – at fáa fólk at taka ímóti og at skilja endamálið við Reyða Krossi – er kanska júst avbjóðingin í framtíðini.

- Vit eru fleiri, sum er virkin her í felagsskapinum. Men vit eru komin nakað upp í árini, og tí kundu vit so gott hugsað okkum at sæð fleiri ung við í arbeiðinum.

- Tað hevði verið sera gott fyri okkum og Reyða Kross um fleiri ung komu við, siga tey.

Tey ungu í dag hava so nógvar møguleikar fyri at síggja og uppliva verðina sum hon er. Og tí áttu fleiri at kunna komið við í arbeiðið og á tann hátt gjørt mun úti í heimi.

Hetta sama ger seg galdandi, tá talan er um skeiðini hjá Reyða Krossi í fyrstuhjálp. Har eru vanliga nógv fólk, men so síggjast tey næstan ikki aftur.

- Tað hevði verið so deiligt um fleiri av hesum kundu blivið virkin í Reyða Krossi,

## Týðandi at gera nakað

Tá formaðurin í Reyða Krossi, Suni Vinther fekk sýndan heiður sýndan í farnu viku, so var hann sum vera man sera fegin um tað.

- Tað at hava gjørt nakað - og at onnur halda at ein hevur gjørt nakað - er týdningarmikið, segði hann.

Hann hevur ongar ætlanir um at steðga við arbeiðinum fyri Reyða Kross, men kom kortini við eini lítlari ábending.

- Eg leiti eftir einum sum kann loysa meg av sum formann í Reyða Krossi.

- Men, legði hann aftrat. Eg steðgi aldrin í Reyða Krossi. Tað er ein lívsstílur.